lívdin
- í lívd hins hægsta

Oktober 2009



# Fyrsta møtið við Vegin Langa



Myndir: Tórvør Vang



Sunnumorgunin 13. september var ein serlig løta, tá fyrra møtið í Lívdini varð hildið á grundstykkinum hjá samkomuni við Vegin Langa. Yvir hundrað fólk vóru savnað á økinum, har bøn varð hildin, og Jógvan Zachariassen talaði. Skipað var eisini fyri onkrum spæli fyri børn og vaksin, eins og vespurnar gjørdu sítt til, at øll fingu nakað av motión í góðveðrinum.



## Einleikin bindur okkum saman

Orð Paulusar í Efesusbrævinum 4:3 hava mangan verið í mínum tonkum seinastu vikurnar: ”Og leggja tykkum eina við at verða verandi í einleika Andans í bandi friðarins.” Eitt tað stuttligasta við visiónstilgongdini, sum vit nú ganga ígjøgnum sum samkoma, er at síggja, at tað er ikki ymiskleikin, ið skilir okkum, men einleikin, sum bindur okkum saman. Vit eru øll sera ymisk, koma frá ymiskum bakgrundum, ymiskum vanum og traditiónum, ymiskum sjónarmiðum, ymiskum meiningum, og øll hava vit okkara meining um, hvussu ein samkoma skal vera, og hvat hon skal gera. Men tað hevur verið gleðiligt at síggja, hvussu vit øll lurta eftir hvørjum øðrum og ynskja at læra av tí, ið hini siga. Eg prísi Harranum fyri hesa samkomu og veit, at henda – mangan drúgva – tilgongdin skal bera ríkan ávøkst. Nei, sanniliga er tað ikki ymiskleikin, ið skilir okkum, men einleikin, sum bindur okkum saman.

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

### Svenning av Lofti 70 ár

Mikudagin 16. september fylti Svenning av Lofti sjeyti ár. Svenning er eiðismaður, sum hevur búð í Havn síðan miðskeiðis í 50-unum. Hann er útbúgvin prentari og hevur seinastu meira enn 30 árini virkað sum evangelistur í brøðrasamkomunum í Føroyum.


*Svenning av Lofti*

Svenning hevur eisini verið virkin í felagnum Sinnisbata, har hann eisini hevur verið formaður, umframt at hann hevur givið fleiri bøkur og traktatir út. Hann er giftur Birgit, f. Restorff, úr Havn. Tey eiga synirnar Petur, Marner og Dan. Føðingardagurin varð hildin í Ebenezer.

### Marita og Leivur við Juvel

Marita og Leivur Guttesen hava verið við trúboðanarskipinum Juvel II í summar. Tey vóru í Grønlandi frá 17. juli til 20. august, og tey vitjaðu einar 10 bygdir í økinum í Diskovíkini og suður eftir til Nuuk. Túrurin hjá teimum endaði við tveimum døgum inni á fjørðinum, har sum barnalegurnar eru.


*Marita og Leivur Guttesen*

### Rannvá gjøgnumførdi marathon

Sunnudagin 6. september luttók seytjan ára gamla Rannvá Djurholm í marathonrenning fyri aldursbólkin 18 ár og eldri. Tað gekst henni somikið væl, at hon gjørdist nummar tvey í kappingini við tíðini 3 tímar, 44 minuttir og 55 sekund. Uttan iva er hon yngsta kvinnan her á landi, sum hevur gjøgnumført eitt marathon, sum er 42.195 metrar.



*Rannvá Djurholm*

### Tillukku við barninum

15. september fingu Shino og Hallur Mortensen, Glasgow, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3.665 gr.


*Modellmynd*

### Verið við til at stuðla!

Við fastari mánaðarligari flyting til byggigrunnin hjá Lívdini, konto nr. 9181-530.707-6 í Eik Banka, ber til at stuðla byggingini av nýggja bygninginum við Vegin Langa. Flytingarskjøl eru á kunningarborðinum í Lívdini sunnudagar.



## Trúboðarar á mansstevnu

Leygardagin 24. oktober verður mansstevna hildin í Badmintonhøllini í Klaksvík. Tríggir av okkara trúboðarum fara at taka lut á stevnuni. Óli á Grømma, ættaður úr Klaksvík, fer at tala um evnið "Samkomuleiðsla", Sonni Poulsen av Sandi fer at tosa um "Læru", og Jógvan Júst Rasmussen úr Klaksvík tekur upp evnið "Ábyrgd mansins heima og í samkomuni".

Sangur fer eisini at merkja dagin. Báðar kvartettirnar fara at syngja, umframt at manskórið í Suðurstreymi eisini tekur lut. Tiltakið er fyri allar menn, og ikki er neyðugt við tilmelding.



*Óli á Grømma, trúboðari*



## Christmas Child

Minnist til at seinasta freist at lata skógva eskjur inn er sunnudagin 25. oktober. Tað eru Durita Djurholm tel. 316099 og Beinta og Gunnvá Áargarð tel. 312655, sum samskipa Christmas Child-tiltakið í Føroyum.

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.**

6. okt. Høvi at luta visiónir og dreymar / Bønarløta
13. okt. Høvi at luta visiónir og dreymar / Bønarløta
20. okt. Húsbólkar (einki møti)
27. okt. Høvi at luta visiónir og dreymar / Bønarløta

## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 4. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Jógvan prátar við Regin og Heidi Guttesen*
*Evni: Hvat er ein trúboðari?*
*Eisini er prát við Ben Rasmussen um tíðina í Manila*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: "Kann ein kristin ivast?" (Matteus 11)*
*Talari: Regin Guttesen*
** Innsavning til nýggja bygningin*


Regin

### Sunnudagin 11. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Syngið við!*
*Anna Háberg leiðir*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visjón: Gávumildni*
*Talari: Ólavur Jøkladal*


Anna


Ólavur

### Sunnudagin 18. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Í heita stólinum: Jógvan Zachariassen*
*og Jóhan Syderbø práta*
*Evni: Hava vit brúk fyri einum bygningi*
*til at útinna visiónir okkara?*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Talari: Jógvan Zachariassen*


Andrew

### Sunnudagin 25. oktober

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Týdningurin av visión. Talari: Andrew Berghamar*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir: Kostnaðurin av mótloysi*
*Talari: Jógvan Júst Rasmussen*


Jóhan

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*


Jógvan Júst

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*